# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 31. mars 2022
Mál nr.:
Málsviðgjørt: JTD
Ummælistíð:
Eftirkannað:

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um frekvensgjøld og ómaksgjøld á radiosamskiftisøkinum

(lækking av ársgjaldi fyri radioketur)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 1 frá 4. januar 2016 um frekvensgjøld og ómaksgjøld á radiosamskiftisøkinum, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Skjal 2 í kunngerð nr. 1 frá 4. januar 2016 um frekvensgjøld og ómaksgjøld á radiosamskiftisøkinum, verður orðað sum ásett í skjali 1.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2022.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, x 2022

**Magnus Rasmussen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Skjal 1**

**“Skjal 2**

**Ársgjøld fyri landstøðir**

| | | |
|---|---|---|
| 1) | Høvuðsstøðir 30MHz, 2m, 4m og UHF (C-loyvi) | kr. 300 |
| 2) | Flytiligar eindir (B-loyvi) | kr. 100 |
| 3) | Hýruvognstøðir við minst 20 hýruvognum skipaðir undir støðini, verða at gjalda eitt samlað gjald fyri hýruvognar og høvuðsstøðina | kr. 3.000 |
| 4) | Radiofjarstýring (fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | kr. 200 |
| 5) | Telemetri (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær, maks. 200 kHz bandbreidd) (S-loyvi)<br><br>Telemetri, breiðband (fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | kr. 200<br><br>kr. 1.000 |
| 6) | Mikrobylgju (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær, maks. 200 kHz bandbreidd) (S-loyvi)<br><br>Mikrobylgju, breiðband (fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | kr. 200<br><br>kr. 1.000 |
| 7) | Samskifti við mátidata (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær, maks. 200 kHz bandbreidd) (S-loyvi)<br><br>Samskifti við mátidata, breiðband (fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | kr. 200<br><br>kr. 1.000 |
| 8) | Mikrofonsendiútgerð (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | kr. 500 |
| 9) | Persónsleitiútgerð (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | kr. 200 |
| 10) | Royndarsendingar undir 3 GHz (S-loyvi) | kr. 500 |
| 11) | Royndarsendingar yvir 3 GHz (S-loyvi) | kr. 700 |
| 12) | Audio Link (S-loyvi) | kr. 500 |
| 13) | Útvarp/Nærvarp (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 14) | Útvarp/Nærvarp í tunlum (Fyri hvønn frekvens) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 15) | Sjónvarp (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | kr. 2.000 |
| 16) | Radioketur:<br>a) Frekvensloyvi (S-loyvi)<br><br>b) Fyri hvørt tillutað MHz í 3-9,5 MHz frekvensbandinum<br><br>c) Fyri hvørt tillutað MHz í 9,5-15 MHz frekvensbandinum<br><br>d) Fyri hvørt tillutað MHz í 15-21 MHz frekvensbandinum<br><br>e) Fyri hvørt tillutað MHz í 21-33,4 MHz frekvensbandinum<br><br>f) Fyri hvørt tillutað MHz í 33,4-57 MHz frekvensbandinum<br><br>g) Fyri hvørt tillutað MHz omanfyri 57 MHz frekvensbandinum<br><br>Kravt verður ikki frekvensgjald fyri seinnu pólariseringina, um dual-pólarisering verður nýtt. | <br>kr. 1.000<br><br>kr. 63<br><br>kr. 38<br><br>kr. 25<br><br>kr. 17<br><br>kr. 11<br><br>kr. 3 |
| 17) | DVB-T (Hvørja kanal sær) (S-loyvi) | kr. 2.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 18) | SNG-fylgisveinasendiútgerð (Satellite News Gathering) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 19) | V-SAT fylgisveinaútgerð (Very Small Apparature Terminal) (Heavy Duty) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 20) | INMARSAT fylgisveinaútgerð | kr. 3.000 |
| 21) | Fastar SAT-jørðstøðir (Føst fylgisveinaútgerð til breitt samskifti) (S-loyvi) | kr. 10.000 |
| 22) | DCS (Digital Cellular System 1800 MHz. (Fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 23) | UMTS 2100 og 2600 (Fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 24) | LTE (Fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 25) | GSM (Global System for Mobile Communication) (Fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 26) | FWA (Fixed Wireless Access) (Fyri hvørji 10 MHz) (S-loyvi) | kr. 3.000 |
| 27) | Nýfrættisútgerð (Reportageútgerð) (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | kr. 500 |
| 28) | MF-útvarpsstøðir (S-loyvi) | kr. 10.000 |

Allýsingar:
C – loyvi: Føst støð á landi.
B – loyvi: Flytilig støð á landi.
S – loyvi: Øll onnur frekvensloyvi á landi, t.d. tíðaravmarkað loyvi, royndarloyvi, loyvi til telemetri, VSAT-loyvi o.a.”